## Nummar 10 í Fair-play

Tað er óneyðugt at endurtaka hvussu tað hevur gingið við úrslitum í altjóða dystum. Tó er at gleðast um, at Føroyar liggja heilt væl fyri á Fair Play-listanum hjá UEFA. Av teimum 52 limalondunum liggja Føroyar nr. 10. Hetta merkir, at í skrivandi stund er Formuladeildin nr. 10 tá tað kemur til at fáa reyð og gul kort. Annars er vanligt at meta Fair Play eftir 6 ymiskum kriterium. 1) Reyð og gul kort, 2) jaligt spæl, 3) virðing fyri mótstøðuleikarunum, 4) virðing fyri dómaranum, 5) atburður hjá venjarum og leiðarum, 6) atburðurin hjá áskoðarunum. Um fótbóltsleikarnir í Føroyum megna at skikka sær enn betur í ár, ja so eru sannlíkindini væl størri, at Føroyar fáa eitt eyka UEFA-cup pláss.

MY GAME IS FAIR PLAY FIFA

## Nýggjan nevndarlim

Eftir øllum at døma verður neyðugt at finna nýggjan nevndarlim, nú Høgni í Stórustovu hevur gjørt av at stilla upp til forsetavalið í FSF. Einki forðar hvørki honum ella Óla Holm til eisini ast stilla upp til starvsnevndarvalið, men tað er ein møguleiki, sum tykist heldur fjarður fyri tann kandidatin, sum tapir dystin um ovasta sessin. Tí er lítið at ivast í, at hetta fram til í annaðkvøld – tá freistin fyri uppstilling er úti – fara feløg at arbeiða við at finna onkran nýggjan kandidat til nevndarvalið.



# oppa Óla

upp, tá talan fleiri ferðir gjørdist um eykaaðalfundir av ymsum slag. Men alt endaði so við, at Christian Andreasen tók dystin upp við Óla Holm. Tá mundu fleiri – ikki minst Christian Andreasen sjálvur – halda, at tryggu atkvøðurnar vóru nóg nógvar í tali.

Tað sama mundi Birgir Enghamar halda fyri tveimum árum síðani, tá hann stillaði upp til valdyst. Núverandi HB-formaðurin tóktist undan fundinum hava ein greiðan meirilutan, men tá atkvøðuseðlarnir vórðu taldir upp, stóð á jøvnum millum hann og Óla Holm. Og tá sitandi formaðurin bara ikki skuldi hava ein meiriluta ímóti sær, vann Óli á málstrikuni.

Hesa ferð verður talan so um triðju royndina at koppa Óla Holm. Og tað er merkisvert, at talan hvørja ferð hevur verið um uppskot úr Havnini. Hóast treytaleysi stuðulin til Christian Andreasen seinni varð broyttur, so var tað upprunaliga HB, sum tók stig til at skjóta Christian upp ta ferðina. Fyri tveimum árum síðani var tað Fram, sum formliga setti Birgir Enghamar í uppskot, og hesa ferð eru tað altso tey seks feløgini í og kring høvuðsstaðin, sum eiga uppskotið.

# Øll kunnu stilla upp



*Menning av umsitingini hjá feløgunum og fíggjarligur stuðul til íløgur er longu sett á dagsskrá í FSF, vísir Óli Holm á*

**Sitandi forsetin fer ikki at nokta nøkrum valevni uppstilling, men hann viðgongur, at hann gjørdist skakkur, tá hann kom eftir, at ein sitandi nevndarlimur stillar upp móti sær**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sitandi FSF-forsetin, Óli Holm, hevur sum so ikki tær heilt stóru viðmerkingarnar til, at hann aftur í ár skal til valdyst.

- FSF er ein demokratiskur felagsskapur hjá føroyskum fótbólti. Og tí hvørki vil ella kann eg forða nøkrum í at stilla upp til forsetavalið, sigur Óli Holm.

Men hann viðgongur, at tað kom óvart á seg, tá hann frætti, hvør mótkandidatur hansara er.

- Vit í starvsnevndini hava sjálvir valt at stuðla Høgna í afturvali til nevndina. Og tí gjørdist eg rættiliga bilsin, tá hann nú stillar upp til forsetasessin. Men hinvegin hevur hann eins góðan rætt sum øll onnur at stilla upp, sigur Óli Holm.

Og hann leggur afturat, at hann í løtuni ikki hevur ætlanir um at leggja frá sær uttan dyst.

### Menningin er ígongd

Sitandi forsetin vísir annars til frágreiðingina, sum hann í fyrradagin læt til feløgini.

Og har verður eisini nógv gjørt burtur úr teimum viðurskiftum, sum Høgni í Stórustovu førir fram, tá um ræður at styrkja feløgini umsitingarliga.

- Krøvini til leiðslu av feløgunum og umsiting annars krevur alsamt meiri hegni, vitan og orku. Í grannalondunum er vanligt, at skeið verða boðin út fyri at menna feløgini. Ætlaninin er bjóða feløgunum til ymisk skeið/temakvøld innan ymisk evni, verður nevnt í frágreiðingini. Og har verða ítøkiliga nevnd fjølmiðlaábyrgdarskeið, skeið fyri trygdarstjórar, skeið fyri starvsfólk í feløgunum, sum verða lønt úr MAFF-grunninum (serstakur FSF-grunnur til umsitingarliga partin hjá feløgunum, blðm.) og leiðsluskeið.

Hartil arbeiðir sitandi nevnd við at styrkja um MAFF-grunnin, soleiðis at feløg eisini kunna søkja um fíggjarligan stuðul til íløgur úr grunninum.